

*Gamla kenda jólabókin er burtur, og ein nýggj bók í tíðarhóskandi hami er komin ístðain*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Broytt og spennandi jólabók

Mín Jólabók er komin út í heilt nýggjum líki. Bókin er nútíðargjørd og nógv meira spennandi at taka í hondina, enn tann gamla var

**UMMÆLI**
*Arthur Gudmundsen*

Mín jólabók, sum flestu familijur keypa hvørjum ári, fæst nú til keyps. Men í ár er jólabókin ikki at kenna aftur.

Fyri nøkrum árum síðani var hon ein lítil, litleys og heldur keðilig bók hjá børnum at lesa. Men nú er hon fylt við litmyndum, sum børnum jú dámar betur at síggja, enn bókstavarað eftur bókstavarað á eini gráari síðu.

Jólabókin hevur í øll undanfarnu ár bert havt barnasøgur, ævintýr og yrkingar, meðan hon í ár hevur alt hetta, umframt eitt nú uppskriftir uppá jólagóðgætið og jólapynt.

Er tann nýggja jólabókin so betri enn tær fyrru? Jú, tað er hon so avgjørt. Søgurnar eru betri og léttari hjá børnumat lesa, og tær eru sera ymiskar, líka frá stuttum ævintýrum til heldur álvarsligar søgur. Royndir rithøvundar hava gjørt søgurnar, og tær eru allar nýggjar, og serliga gjørdar til Mína Jólabók.

Uppskriftirnar, bæði uppá mat og jólapynt, eru gjørdartil børn og foreldur teirra, og tilfarið til hesar uppskriftir er altsamalt uppruna føroyskt. Eisini er ein skemtilig, vísundalig grein um tey ymisku vættrasløgini í Føroyum.

Mín jólabók hevur altíð havt jólaevangeliið við, sum fastan tátt, og tað er sjálvandi eisini í hesari útgávuni. Nú er tað eisini foreinklað til børn. Jólabókin er býtt upp í 24 partar, men hetta forðar tó ikki lesaranum í at lesa hana í teirri raðfylgju, hann sjálvur vil.

Beinta Johannesen og Elin á Rógvi gjørdu av at fornýggja jólabókina, og tað hava tær klára væl. Elin hevur skrivað nakrar av teimun mongu søgunum, og Beinta hevur gjørt allar tær ymisku tekningarnar. Beinta Johannesen hevur eisini teknað til millum annað, barnakókibókina Matur í myndum. Vónandi klára tær at halda nýggja støði hjá Míni Jólabók, í framtíðini. Jólabókin er farin frá at vera ein gamal, keðiligur siður, sum oftast verður beind burtur, til eina áhugaverda barnabók, sum man gleðir seg til. Mín jólabók er 80 síður, og fæst í øllum bókahandlum fyri 130 kr.




tá Danmark vann EM í 1992?



**Jákup Mørk, ítróttarskrivari:**

– Eg var til eina studentaveitslu hjá einum gomlum floksfelaga. Vit sótu øll og hugdu at dystinum, áðrenn vit fóru til borðið. Tað var spennandi. Vit tippaðu ikki undan dystinum, men hetta var áðrenn tjóðskaparøsingina í Føroyum, so øll vónaðu, at Danmark fór at vinna. Tað var eitt øgiligt róp og skrál, tá Faxe fyrst og síðani Vilfort skoraðu málini hjá Danmark.

Eg haldi ikki, at øll beinleiðis væntaðu, at Danmark nokk fór at tapa undan dystinum, tí teir høvdu yvirraskað so nógv við úrslitunum í bólkaspælinum, at nærum alt var gjørligt hjá teimum.

Tá so dysturin var av, og Danmark hevði vunnið, bleiv veitslan bara jú tað betri.

Dagin eftir var eg til eina aðra veitslu, og har spældi tann sama singleplátan allatíðina. Tað var ein við Re-Sepp-Ten á A-síðuni og so En for alle frá 1988 á hinari.

Tað bleiv nokk tosað nógv um hesa sensatiónina, men Søren Lerby segði einaferð: Tú ert ongantíð betur enn tín seinasti dystur. So tá Danmark legði út við einum ússaligum javnleiki í HM undankappingini aftaná, mundi alt tosið um EM sigurin tagna.



**Birgir Enghamar, formaður í HB:**

– Eg sat heima við hús og hugdi at dystinum saman við mínum trimum synum og dótrini. Vit vóru øgiliga spent, tí Danmark hevði jú bara tapt móti Svøríki í bólkaspælinum.

Tað stuttliga við hasari EM kappingini, haldi eg, var mátin, sum Danmark kom við uppá. Teir høvdu jú ikki kvalifiserað seg, men sluppu við, tí at Jugoslavia mátti taka seg aftur, tí tað var so ófriðarligt har um leiðir beint tá.

Og so endar tað við, at danskararnir koma aftur úr Svøríki sum EM vinnarar. Tað var heilt fantastiskt og virkuliga stuttligt hjá teimum.

Vit vónaðu sjálvandi, at danskararnir fóru at vinna, men tað at teir ikki høvdu tapt meira enn ein dyst frammanundan, gjørdi sítt til, at man kanska væntaði eitt tap.

Frøin var stór, tá sigurin var heima. Tað er púra sikkurt. Og sjálvt eisini hjá einum tjóðveldissinnaðum manni sum mær.

Eg meini so við, tað er ikki tað, sum málið millum Føroyar og Danmark snýr seg um.

Man heldur fyrst og fremst við Danmark, rúka teir út, so Svøríki ella Noreg og so Ongland og so víðari. Soleiðis er tað bara.

**- sae -**